# 7.000 danskar fyritøkur á veg á húsagang

**Afturgongdin í danska búskapinum kann koyra fleiri túsund fyritøkur á heysin næsta ár**

Danir merkja nú av álvara afturgongdina í búskapinum, og sambært Børsen kunnu húsagangir í vinnulívinum fara at kosta meiri enn 50.000 arbeiðspláss tað næsta árið.

Tey almennu tølini fyri síðsta mánað vísa, at tá fóru 524 danskar fyritøkur á húsagang, og tað var heili 70 prosent fleiri enn í november í 2007. Serfrøðingar, sum Børsen hevur tosað við, ivast ikki í, at talið verður størri enn.

- Heldur hendan gongdin fram, fáa vit ein trupulleika, sum eg satt at siga ikki orki at ímynda mær, sigur Peter Hecht-Hansen, stjóri í kredittryggingarfelagnum Euler Hermes við blaðið.

Erik Skovgaard Nielsen, sum er varastjóri í einum øðrum kredittryggingarfelagi, Atradius, er samdur við starvsbróðurinum um, at útlitini eru alt annað enn jalig.

- Tað er líkt til, at vit fáa tvær ferðir so nógvar húsagangir í 2009 sum í ár, so vit kunnu vænta einar 7.000 húsagangir teir næstu tólv mánaðirnar. Fleiri øki í vinnuni verða rakt, men vandin tykist vera serliga stórur í handilsvinnuni, byggivinnuni, møbla- og klæðnavinnuni og innan elektroniskt virksemi, og tað ger ikki støðuna betur, at bankarnir eru so varnir við kredittum, sigur Erik Skovgaard Nielsen við Børsen.

Teir seinastu tólv mánaðirnar eru 3.500 danskar fyritøkur farnar á húsagang. Tað er umleið helvtina meiri enn í 2007.



*Væntandi fara nógvar fyritøkur í donsku byggivinnuni á húsagang í 2009*

*Mynd: Håndværksrådet*

# Fiskimaðurin hevur vandamesta starvið í heiminum

**Tað kann vera 115 ferðir vandameiri at vera fiskimaður enn at hava annað arbeiði**

Tað er í hvussu er úrslitið av kanningum, sum eru gjørdar í Bretlandi, og sum tann viðurkendi stovnurin MAIB hevur gjørt. MAIB hevur kannað umstøðurnar í sambandi við øll deyðsføll umborð á bretskum skipum og bátum í mong ár, og í hesari kanningini hevur stovnurin kannað og samanfatað allar vanlukkur á sjónum í tíðarskeiðinum frá 1992 til 2006, skrivar Fishing News.

Hesi árini doyðu 256 bretskir fiskimenn á sjónum, og tá eru frítíðarfiskimenn ikki taldir við. Við at samanbera talið á teimum, sum eru deyðir á sjónum, við talið á fiskimonnum sum heild og við at bera lutfallið millum hesi tølini saman við tilsvarandi tøl í øðrum vinnugreinum kemur MAIB til ta niðurstøðu, at tað er 81 ferðir vandameiri at vera fiskimaður enn at vera í framleiðsluvinnuni og 24 ferðir vandameiri enn at arbeiða í byggivinnuni. Samanborið við vinnulívið sum heild er tað 115 ferðir vandameiri at vera fiskimaður enn at hava annað starv.

Harafturat vísir tann bretska kanningin, at meðan arbeiðsvanlukkurnar fækka í øllum øðrum vinnugreinum, er talið at kalla óbroytt í fiskivinnuni á sjónum. Árið í fjør var tó eitt undantak í so máta, sigur MAIB.

Eitt, summ er vert at taka fram, er, at av teimum 256 fiskimonnunum, sum doyðu á sjónum í árunum frá 1992 ril 2006, var tað bara ein, sum var í bjargingarvesti. At tann eini persónurin doyði komst av, at hann hevði ein óhóskandi bjargingarvest.

Í bretska fiskimannafelagnum harmast tey um, at nógvir fiskimenn eru so gáloysnir. Tey mæla øllum fiskimonnum til taka trygdarútgerðina í størri álvara. Felagið sigur eisini, at tað rætta hevði verið, at fiskimenn altíð hava elektroniska útgerð uppi á sær, so radiosignal kunnu siga frá, hvar teir eru staddir, skuldi okkurt borist á.

